# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 5

ISSN 0907-905X

Nr.14

3. mars 2010

**Kunngerð**
**um**
**tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð**

Við heimild í § 23 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum broytt við løgtingslóg nr. 171 frá 21. desember 2001, verður ásett:

**§ 1.** Fyri avgreiðslur av skipum og flogførum
1) mánadag til fríggjadag millum kl. 16.00-08.00 og
2) allan dagin leygardag, sunnu- og halgidag,
er avgreiðslugjaldið kr. 350,00 um tíman fyri hvørt tolleftirlitsfólkið. Minsta gjaldið er fyri 2 tímar fyri hvørt tolleftirlitsfólkið.
*Stk. 2.* Skip, sum kemur til aðra havn enn tær í § 6, stk. 2 í kunngerð um tolleftirlit góðkendu havnir, skulu umframt avgreiðslugjald eftir stk. 1, fyri hvørt tolleftirlitsfólkið rinda tíma- og dagpening og koyripening eftir avtaluni millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið.
*Stk. 3.* Skip, sum ikki kemur at bryggju, skal rinda tær útreiðslur, sum avgreiðslan hevur við sær.

**§ 2.** Fyri aðrar avgreiðslur
1) mánadag til fríggjadag millum kl. 16.00-08.00 og
2) allan dagin leygardag, sunnu- og halgidag,
skal fyri hvønn inn- ella útflytara ella annan avgjaldsskyldugan, rindast avgreiðslugjald uppá kr. 350,00 um tíman. Minsta gjaldið er fyri 2 tímar fyri hvønn inn- ella útflytara ella annan avgjaldsskyldugan.

**§ 3.** Tollvakt við skip ella flogfar skal skipið ella flogfarið rinda kostnaðin av. Gjaldið er kr. 350,00 um tíman. Minsta gjaldið er fyri 2 tímar fyri hvørt tolleftirlitsfólkið.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 93 frá 21. desember 2004 um tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð.

Fíggjarmálaráðið, 3. mars 2010

**Jóannes Eidesgaard (sign)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge (sign)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705